# Trapputing um tjóðskaparliga semju

**Formenninir í fýra teimum størstu flokkunum fara mánakvøldið at umrøða møguleikan og útlitini fyri tjóðskaparligari semju í stjórnarskipanini, sum tað nú verður arbeitt við**

TRAPPUTING
*Jan Müller*

Mánakvøldið verður enn eitt trapputing í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Umboð fyri fýra teir størstu flokkarnar eru bodnir at skifta orð um møguleikan fyri tjóðskaparligari semju í stjórnarskipanini, sum tað verður arbeitt við.

Formenninir í Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum hava boðað frá, at teir fara at møta á fundinum. Fólkaflokkurin hevur boðað frá, at teirra umboð verður Poul Michelsen løgtingsmaður, sum umboðar flokkin í stjórnarskipanarnevndini.

Umframt politisku umboðini verður Kári á Rógvi við í orðaskiftinum. Kári er í holtur við Ph. D. lestur við lærda háskúlan í Reykjavík. Hann granskar í grundlógum og stjórnarskipanum. Harafturat undirvísir hann í Reykjavík, á lærda háskúlanum á Akureyri og eisini í skeiðnum í lóg, sum Fróðskaparsetur Føroya bjóðar út.

Trappputingið verður í Miðlahúsinum nú mánakvøldið. Jóannes Hansen verður orðstýrari. Tá ið teir fýra politikararnir hava havt hvør sítt innlegg á fimm minuttir verður orðaskiftið, har tað verður roknað við, at áhoyrararnir eisini fara at taka lut. Fundurin ætlast at vera liðugur umleið klokkan 21.30.

# Stórar kursbroytingar




*Talvan sýnir kursbroytingar og handlar á Atlantic Petrolium-partabrævinum í dag*

Tíðindini um stóru kursbroytingarnar á partabrævinum hjá Atlantic Petroleum (AP) hava av álvara sett ferð á handilin av partabrævinum.

Eftirspurningurin er økt-ur við øgiligari ferð, og so eru marknaðarkreftirnar av álvara traðkaðar til. Er prísurin nóg høgur, vilja fleiri brádliga selja - og við hækkandi útboði fellur prísurin aftur.

Tá marknaðurin í Íslandi læt upp hósdagin, var kursurin á AP-partabrævinum oman fyri 800, og fyrra helmingin av degnum helt hann sær eisini á hesum støði. Men stutt eftir døgurða kom av álvara fall í prísin, soleiðis at kursurin við dagslok var komin niður á 639.

Hvørt hetta er eitt meira veruligt virði á partabrævinum, fara komandi dagarnir helst at geva eina góða ábending um. Sannlíkt er í øllum førum, at kursbroytingarnar verða hampuliga stórar. Hetta vil kanska skapa nakað av varsemi millum teirra, sum handlað á marknaðinum, men samstundis gevur hetta eisini góðan gróðrarbotn fyri skjótum spekulatiónshandlum, og tí kann talan væl gerast um nógvar transaktiónir komandi dagarnar. Hósdagin setti handilin við partabrævinum met við 10 mió kr., og hóast kursfallið seinnapartin, er langt ífrá víst, at hetta metið verður standandi serliga leingi. Ikki minst, tí talan - hóast kursfallið - framhaldandi hevur verið um eitt sera gott avkast hjá størsta partinum av íleggjarunum.

At hetta er gjørligt, kemst partvíst av, at Atlantic Petroleum er fyrsta oljupartabrævið, sum er skrásett á ICEX. Tí hevur kursdannilsið her ikki sama automatik, sum eitt nú er galdandi á London Stock Exchange, har hópin av oljufeløgum eru noterað.

**-mørk**




## MANNING TIL MÓTTØKUNA

### Søkt verður eftir fólki til móttøkuna umborð á Norrönu

Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum altjóða tænastustigi. Tað er krav, at umsøkjararnir duga væl danskt og enskt í skrift og talu og annars hava kunnleika til hini norðurlendsku málini umframt týskt ella onnur fremmandamál. Tað er ein treyt, at móttøkufólkini hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

Roknast skal við upplæring á skrivstovuni, áðrenn farið verður umborð.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst** (Ikki eldri enn 2 ár).

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (Ikki eldri enn 5 ár).

Smyril Line bjóðar størv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Umsóknir og CV skulu vera okkum í hendi innan 6. februar 2006 og skulu sendast til:

Smyril Line
Manningardeildin
Jónas Broncks gøta 37
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

Ella við telduposti til:
crew@smyril-line.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og í dag selja og marknaðarføra vit Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland og Danmark um allan heimin.

Høvuðsskrivstova felagsins er í Tórshavn. Eisini hevur Smyril Line skrivstovur í Hanstholm, Bergen, Reykjavík, Kiel og í Lerwick. Agentar eru í Svøríki, Finnlandi, Týsklandi, Eysturríki, Sveits, Benelux, Fraklandi og Italia.

SMYRIL LINE · EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM






Føroyaprent fer nú at menna marknaðar- og søluarbeiðið, og søkja vit tí eftir søluleiðara. Tú skalt, saman við tilboðsroknarum og virkissamskipara, styrkja tey trý grundleggjandi virðini hjá okkum, sum eru: rættur prísur, góðska og levering til tíðina.

**Vit hugsa okkum, at tú:**
- helst hevur eina viðkomandi útbúgving innan sølu og marknaðarføring
- hevur royndir við B2B sølu
- hevur lætt við at samskifta við viðskiftafólk og starvsfelagar
- dugir at orða teg í talu og á skrift
- hevur lætt við at koma í samband við fólk
- hevur áræði, ert álítandi, nærlagdur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- at títt fremsta mál er at fáa kundarnar at kenna seg nøgdar

**Ábyrgdarøki**
Sum søluleiðari hevur tú ábyrgd av allari sølu og marknaðarføring, tað verður tín uppgáva at styrka sambandið við viðskiftafólk okkara, eins og tú skapar samband við nýggjar kundar.

Fram um alt skalt tú virka undir tí grundleggjandi treytini: Eitt orð er eitt orð.

**Arbeiðsviðurskifti**
Á Føroyaprent bjóða vit tær eitt mennandi umhvørvi. Tú fært eitt avbjóðandi starv, sum er at menna størsta grafiska virkið í Føroyum. Málið er sjálvandi ein sunnur øktur umsetningur. Tú fert at virka undir stjóranum og í okkara leiðslubólki

Løn sambært avtalu.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Vilt tú vita meira, so ring til Jon Hestoy, stjóra, á telefon 59 45 55.

**Umsóknarfreist 22. januar 2006**

Skrivlig umsókn við CV verður at senda til:
Pf. Føroyaprent
att.: Jon Hestoy
Postsmoga 3118 - 110 Tórshavn

Hoyvíksvegur 59 · Postsmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel. 31 45 55 · fax 31 80 26 · hestoy@foroyaprent.fo

Føroyaprent